# Føroyingar keypt nýtt dansistað í Danmark



*Talan verður ikki um ein kappingarneyta til Jackways, siga Michael og Dánial Petur, sum í næstum lata dyrnar upp í Club Cairo*

**Tveir føroyingar hava keypt ein stóran náttklubba, sum liggur mitt í Keypmannahavn. Staðið, sum seinastu seks árini hevur verið strippklubbi, skal nú verða verða náttklubbi við egyptiskum íblástri, og ætlanin er ikki at kappast við Jacques um føroyskar gestir**

NÁTTARLÍV
*Eyðun Klakstein*

Nú hava føroyingar aftur gjørt eitt átak í danska náttarlívinum.

Michael Christiansen og Dánial Petur Thorsteinsson hava keypt ein náttklubba í trimum hæddum, sum liggur í hjartanum í Keypmannahavn, og har ætla teir at satsa við einu nýggjum og eksotiskum dansistaði.

Føroyingar í Keypmannahavn hava rættiliga tikið dansistaðið Jacques, har Todi Jónsson er ein av eigarunum, til sín, og nýggja dansistaðið ætlar sær ikki at fara at kappast um føroysku kundar í danska náttarlívinum.

– Vit ætla ikki at spæla føroyskan tónleik ella hava føroyskar plátuvendarar, tí vit fara ikki at kappast við Jacques um føroyingarnar, sum fara í býin í Keypmannahavn. Føroyingar eru sjálvsagt vælkomnir hjá okkum, men tað eru danir, sviar og norðmenn eisini. Staðið er heilt einfalt ov stórt til, at vit fara at satsa upp á føroyingar, sigur Michael Christiansen.

## Frá stripp til dans

Náttklubbin liggur í Østergade, sum er nærindis Kongens Nytorv – einar 200 metrar frá Strøgnum – og tað verður mett sum eitt sera gott stað til ein náttklubba. Fleiri kend og væl umtókt støð eru í nánd, og tað plagar at lokka nógv fólk í býin har um leiðir.

Staðið hevur seinastu seks árini gingið undir navninum Velvet Club og hevur verið ein strippklubbi.

Men tey, sum kanska nú vænta ein føroyskan strippklubba í Keypmannahavn, mugu fáa armarnar niður aftur beinanvegin, tí føroysku eigararnir fara at gera staðið aftur til eitt dansistað, sum tað eisini var øll áttatiárini og fram til miðskeiðis í nítiárinum.

Føroysku eigararnir hava fingið lyklarnar til náttklubban, men teir eru noyddir at fara ígjøgnum alla mylluna fyri at fáa loyvi til at hava dansistað, og hetta rokna teir við kemur upp á pláss innan tvær vikur.

## Egyptiskur íblástur

Hóast teir nú bíða eitt sindur eftir myndugleikunum, hava teir langt síðani gjørt av, hvat teir ætla at brúka tað 640 fermetra stóra dansistaðið til.

– Vit fara at gera eitt stað við eitt sindur av egyptiskum íblástri. Tað skal eita Club Cairo, og vit fara at stíla eftir teimum, sum eru 23 ár og eldri, sigur Michael Christiansen.

Tað eru nógv dansistøð í Keypmannahavn, sum kappast um tey heilt ungu, og hesa kapping ætla føroyingarnir sær ikki at blanda seg uppí.

– Kappingin um tey heilt ungu er sera hørð, og tað ávirkar eisini prísirnar, so at tú nógva staðni kanst uppliva verulig discount-diskotek, sigur Michael Christiansen.

– Vit halda, at tey ungu, sum eru eitt sindur eldri – úr 23 árum og upp í 30'ini – eru ein meira áhugaverdur málbólkur hjá okkum. Tað eru bara heilt fá støð, sum stíla eftir hesum málbólki, og tí halda vit, at tey mangla eit t gott stað at fara í.

## Opið tvey kvøld um vikuna

Bæði Michael Christiansen og Dánial Petur Thorsteinsson hava tilknýti til eitt annað stað í danska náttarlívinum, sum føroyingar kenna væl – nevniliga Skarv. Tað var í nógv ár miðdepilin hjá føroyingum í Keypmannahavn, men nú er tað ikki til longur. Dánial Petur átti og eigur framvegis staðið, har Skarv var, men nú gongur tað undir navninum Lemon og er ikki nakað føroyskt stað burturav.

Club Cairo skal hava opið fríggjakvøld og leygarkvøld, og tá verður siglt við fullum seglum. Eini 20 fólk skulu arbeiða har, og pláss er fyri 450 gestum.

– Vit ætla okkum ikki at hava opið til dømis hóskvøld, tí tá eru tað mest tey heilt ungu, sum fara í býin, og vit vilja ikki lokka tey at koma inn til okkara, tá ið tað eru onnur fólk, sum vit vilja hava fríggjakvøld og leygarkvøld. Fyri at vit ikki skulu blanda alt saman, hava vit bara opið tvey kvøld, sigur Michael Christiansen.

Hann sigur tó, at teir eru opnir fyri, at onnur kunnu hava tiltøk har, tá ið Club Cairo ikki er opin. Tað er ikki óvanligt, at aðrir klubbar leiga seg inn í slík høli ávís kvøld at hava tiltøk. Tað hevur eisini verið gjørt á eitt nú Jacques.

Føroyingarnir rokna við, at Club Cairo fer at lata upp síðst í februar mánaði ella fyrst í mars mánaði.

# Fimm stovnar skulu ganga undan í teldutrygd

**KT-Forum mælir til, at nýggi almenni teldupolitikkurin verður førdur út í lívi á fimm stovnum fyrst. Restin av almennu umsitingini skal síðani læra av royndunum hjá hesum pilotprojektum**

TELDUTRYGD
*Eyðun Klakstein*

Almenna umsitingin hevur eina stóra uppgávu fyri framman. Nýtslan av kunningartøkni skal samskipast og gerast tryggari, og tað fer at krevja nógv.

Teldutrygdin hjá tí almenna er ov vánalig, og eftir støðugar atfinningar frá eitt nú Landsgrannskoðaranum, er KT-Forum komið við einum uppskoti um, hvussu tamarhald kann fáast á støðuni.

KT-Forum er mannað við umboðum fyri aðalráðini í landsfyrisitingini og hevur seinastu tvey árini arbeitt við at orða ein teldupolitikk fyri landið.

Hetta uppskot er nú liðugt og verður seinni í hesum mánaðinum lagt fyri aðastjórarnar at taka støðu til.

KT-Forum mælir til, at ein nýggjur standardur verður settur at galda fyri allar almennar stovnar. KT-Forum mælir til, at hesin standardur verður tann sokallaði ISO 17799, sum er tann mest nýtti av sínum slagi.

## Tung uppgáva

Tað verður ikki eftir einum degi, at almennu Føroyar fáa ein nýggjan og betri samskipaðan teldupolitikk.

– Tað er ikki yvir at dylja, at verksetanin av regluverkinum verður ein stór og tung uppgáva hjá fyrisitingini, og sum er hevur fyrisitingin av góðum grundum ikki nóg góðan førleika at byggja upp og at seta í verk kt-trygdarkervi sambært standardunum, sigur KT-Forum í sínum uppskoti.

– Neyðugt at leggja eina skynsama tilgongd til rættis, har roynt verður at viga upp ímóti vandamálum og forðingum. Hetta kann gerast við at nakrir stovnar ganga undan í arbeiðinum, og at royndirnar hjá teimum koma øðrum stovnum til nyttu. Mælt verður tí til at seta pilotverkætlanir í verk á nøkrum stovnum, og at aðrir stovnar samstundis arbeiða við málinum, tó við lægri ferð, og við leiðbeining.

## Byrja við fimm stovnum

KT-Forum mælir til at at seta pilotverkætlanir í verk á fimm stovnum, sum í støðd og virkisøki eru ymiskir – til dømis eitt aðalráð, ein skúli og tríggir -stovnar við ymiskari støðd og ymiskum virkisøki.

– Mælt verður til ikki at seta pilotverk-ætlanir í verk á teimum størstu og kt-tyngstu stovnunum. Best er, um allir fimm stovnarnir hava onkrar upplýsingar, ið koma inn undir persónsupplýsingarlógina, heldur KT-Forum, sum heldur, at tað er rætt at brúka bæði føroyska og útlendska ráðgeving í hesum arbeiði.

– Tann útlendska skal verða mest brúkt í byrjanini, í ávísum stigum í verkætlanunum og annars í serligum førum.

Og royndirnar hjá hesum fimm stovnum skulu síðani brúkast til at gjøgnumføra broytingar á øllum hinum stovnunum.

Men áðrenn nakar kemur so langt, skulu aðalstjórarnir taka undir við tilmælinum frá KT-Forum, og teir sleppa at taka støðu til alt hetta, tá ið ta lidna álitið verður lagt fyri teir um stutta tíð.



# Trupult at vinna fram í Norðoyggjum



*Fólkaflokkurin sólar sær í Klaksvík og Norðoyggjum, har undirtøkan hjá flokkinum tykist framhaldandi at vera stór*

**Tað er tungt at taka ein valdømisvaldan tingmann í Norðoyggjum, metir Sambandsflokkurin. Fólkaflokkurin tykist at varðveita eina javna og stóra undirtøku**

VELJARAKANNING
*Heri á Rógvi/*
*Páll Holm Johannesen*

Stóra veljarakanningini hjá Sosialinum og FYND gevur Sambandsflokkinum útlit til eitt óføra gott val. Bert í Sandoynni og í Norðoyggjum stendur illa til hjá Sambandsflokkinum.

Fólkaflokkurin er somikið sterkur í Norðoyggjum, at hann fær bæði tann fyrsta valda tingmannin og tann fjórða.

34,1% er úrtøkan í veljarakanningini hjá Fólkaflokkinum í Norðoyggjum. Sambandsflokkurin eigur 16% av atkvøðunum, Javnaðarflokkurin 18,3% og Tjóðveldisflokkurin fær 20,6%.

Sum vit eisini skrivaðu í blaðnum í gjár, so er Sambandsflokkurin ikki so øgiliga langt burturi frá einum valdømisvaldum tingmanni. Útfrá úrslitið við seinasta løgtingsval í Norðoyggjum skulu knappar tretivu Fólkafloks atkvøður glíða ein bókstav niður á valseðlinum, um veljarakanningini er eftirfarandi.

## Sympati við Anfinn

Eitt av valevnunum hjá Sambandsflokkinum í Norðoyggjum, Magni Laksáfoss, sigur, at tey ikki eru nøgd við úrslitið í veljarakanningini, men tað tey rokna kortini við einum betri úrslitið valdagin.

- Vit kunnu fegnast um eina framgongd. Norðoyggjar eru ikki eitt etablerað valdømi hjá Sambandsflokkinum - men eitt valdømi, sum skal byggjast upp, sigur Magni Laksáfoss.

Hann heldur, at ein av frágreiðinginum fyri góðu undirtøkuna hjá Fólkaflokkinum er, at fólk hava sympati við Anfinn Kallsberg.

## Støðug framgongd

Anfinn Kallsberg fegnast um, at Fólkaflokkurin gongur fram í Norðoyggjum, sum eisini valdømi hjá løgmanni. Sambært kanningini fær Fólkaflokkurin 34,1 av samlaða atkvøðutalinum í Norðoyggjum og tað er ein framgongd síðan seinasta val.

Spurdur, um hví Fólkaflokkurin fær so góð úrslit í Norðoyggjum, svarar Anfinn, at rákið seinastu árini hevur verið, at Fólkaflokkurin vinnur størri og størri undirtøku millum veljararnar í Norðoyggjum.

- Í 1998 fingu vit 28, 5 % av atkvøðunum og í 2002 var talið 32,1%, so trendið er, at vit fáa størri og størri undirtøku, og tað fegnast vit sjálvsagt um, sigur Anfinn Kallsberg.

# Listamaður í SMS

Herfyri var ein forvitnisligur listamaður í SMS. Hesin málaði vakra portrettmyndir av fólki. Navnið á manninum er Emil Zahariev. Hann býr í London, men er úr Bulgaria. Hann hevur lært at mála á skúla og hevur nógvar royndir. Av tí at hann ikki hevði øll loyvi í lagi í sambandi við vinnuligt virksemi, er hann farin av landinum aftur, men hann ætlar sær aftur til Føroya í apríl.

**-HR**



*Emil Zahariev málaði portrettmyndir í SMS herfyri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# LØGTINGSVAL04



**Ása Olsen**
*Sjálvstýrisflokkurin*
*Suðurstreymoyar valdømi*



**Mamy Dahl Sørensen**
*Javnaðarflokkurin*
*Norðoya valdømi*



## Heimarøkt

**Hvørjar ætlanir hevur tú á heimarøktarøkinum?**

Ása Olsen:

- Veruleikin á heimarøktarøkinum er hann, at játtanin ongantíð heldur. Tískil mugu vit inn at kanna og staðfesta, hvør orsøkin til hetta er. Er tað tað, at landssjúkrahúsið sparir við at senda fólk heim?

Ella er orsøkin, at fólk eru eldri og uppgávurnar í heimarøktini av tí sama eru vorðnar tyngri? Eg trúgvi, at tað er tað seinna.

Um tað er rætt, so skal játtanin økjast eftir tí tyngdini, sum er í heimarøktini í dag. Tí tað eru nógvir røktartungir brúkarar, sum liggja heima, og í verandi støðu er tað so sanniliga ikki nøktandi.

Mamy Dahl Sørensen:

- Pengar skulu setast av til heimarøktina, so at øll tey, sum ynskja at fáa heimarøkt, kunnu fáa hana.

Tað átti eisini at verðið skilt ímillum heimarøkt og sambýli. Tí sambýlini eru komin fyri at verða, og tey fáa sínar pengar. Men tá tey eru saman, gongur tað út yvir játtanina til teir brúkarar, sum eru úti í økinum. Tey, sum hava minst, fáa altíð minni, og tí má og skal tað skiljast ímillum hesu bæði.

**Skulu fólk kunna búgva í teirra egna heimi, so longi tey ynskja tað?**

Ása Olsen:

- Ja, so avgjørt skulu tey sleppa at búgva í egnum heimi, so longi tey ynskja tað. Tey hava jú helst sjálvi verið við til at bygt húsið og heimið upp. Øll minnini eru har, so ja, avgjørt.

Mamy Dahl Sørensen:

- Ja, sjálvandi skulu tey tað. Tey skulu kunna velja sjálvi, um tey ynskja at verða búgvandi í teirra egna heimi ella sleppa á eitt heim.

**Áttu sjálvbodnar tænastur at verðið samskipaðar við heimarøktini?**

Ása Olsen:

- Um vit taka vitjunartænastuna sum dømi, so haldi eg, at slíkar sjálvbodnar tænastur kundu verðið samskipaðar við heimarøktini. Heimarøktin kemur jú út í hvørt heim og vitar, hvar tørvurin veruliga er. Og harvið síggja tær eisini hvørji eru einslig og trongja til vitjan.

Mamy Dahl Sørensen:

- Tað hevði verið gott við fleiri sjálvbodnum tænastum, men eg trúgvi, at tað verður torført at samskipa tær við heimarøktina.

Til dømis er ein eldraáhugabólkur í norðoyggjum, sum skipar fyri nøkrum eldratiltøkum um árið. Og serliga har hevði tað verið gott, um eitt nú einstaklingar kundu hjálpt teimum mongu, sum eru einslig.

Møguliga hevði tað verið eitt betur hugskot at samskipað sjálvbodnar tænastu við til dømis Dagtilhaldini, sum eru kring landið. Og harvið kundu tilhaldini verðið kunnað um eldratiltøk og verið við til at eggjað teimum eldru til at fara til slík tiltøk.

**Hvat er betur, høkir ella gangistativ?**

Ása Olsen:

Gangistativ er betur, tí tað er tryggari. Men høkir eru sjálvandi eisini góðar.

Mamy Dahl Sørensen:

- Bæði eru góð, men rulli-Maria er best.